gult4 cyan4 magenta4 svart4

gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Stórarbeiði á Dímun

**Tyrlupallurin á Stóru Dímun skal víðkast í summar. Arbeiðið er boðið út, og fer helst at taka meira enn ein mánaða at gera, metir Dímunarbóndin**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Tyrlupallurin á Stóru Dímun skal víðkast í summar eftir kravi frá loftferðslumyndugleikunum*
*Mynd: Edvard Joensen*

Tyrlupallurin á Stóru Dímun skal víðkast sambært teimum krøvum, sum loftferðslumyndugleikarnir seta. Arbeiðið er boðið út, og lisitatión verður 15. juni.

Óla Jákup úr Dímun, bóndi í Stóru Dímun, sigur, at arbeiðið, sum nú skal gerast, er at gera trygdarøki rundan um sjálvan betongpallin, sum tyrlan lendir á.

Hann sigur, at hetta er stórarbeiði, sum helst fer at taka meira enn ein mánaða at gera. Tað er rættiliga nógv, sum skal gravast burtur, og tað er hart tilfar, sigur hann. Tí metir hann, at ein stór maskina skal til fyri at fáa grivið omanav.

Maskinan má fáast út á Dímun við tyrlu, sigur Óla Jákup úr Dímun. Verður tað við teimum tyrlunum, sum í løtuni eru i landinum, má hon uttan iva takast sundur, metir hann.

Dímunarbóndin sigur, at hann fer ikki sjálvur at bjóða upp á arbeiðið, hóast hann gott kundi hugsað sær tað.

Í fyrsta lagi hevur hann onga maskinu, sum er nóg stór til tann útgrevsturin, sum krevst.

Í øðrum lagi, sigur hann, metir hann arbeiðið at vera ov seint boðið út. Tað skuldi helst ikki verið byrjað seinni enn í apríl, um hann skuldi gjørt nakað við tað. Tí sum er, er ov nógv annað av dagliga arbeiðinum í oynni, tað kemur at falla saman við.

Annars varð nýggjur viti settur upp í Dímun í fjør, og tá stroypti Óla Jákup fundamentið.

– Men tað var nógv minni arbeiði enn hetta, sigur hann. Tað var bara at stoypa eitt lítið sindur upp í gamla fundamentið, og so kom tyrlan út við vitanum og setti hann niðurá.

Byggideildin hjá Landsverkfrøðinginum sigur í útbjóðingarlýsingini í samband við víðkanina av tyrlupallinum, at arbeiðið í stórum umfatar útgrevstur, sum mettur verður til eina 2.400 rúmmetrar. Síðan skal fyllast upp aftur og planerast okkurt um 800 rúmmetrar. Skráar skulu gerast rundan um, sum mettir verða til knappar 1.400 fermetrar, umframt at dren og kloakk, upp á umleið hálvtannaðhundrað metrar, skulu leggjast. Eisini skulu nøkur smærri fundament stoypast, eins og økið skal stikast av.



*Lomvigastovnurin tykist óbroyttur, sigur Dímunarbóndin*
*Mynd: Edvard Joensen*

### Fólkafundur

Stóra Dímun er útferðarstað, sum verður dúgliga vitjað. Kunningarstovan á Sandi skipar til dømis fyri útferðum til Dímunar, eins og Norðlýsið í fleiri ár hevur gjørt túrar út hagar.

Tann 17. juni verður skipað fyri útferð og fólkafundi í Stóru Dímun. Tað er Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag, sum skipar fyri, sigur Óla Jákup úr Dímun.

Hann sigur, at enn hevur hann ikki fingið nakra nágreiniliga skrá, men hevur tó skilt, at ætlanin er at fáa bæði Norðlýsið og Jóhonnu at sigla fólk út. Ætlanin er at fáa nógv fólk við, sigur hann.

Tiltakið verður skipað sum ein útferð, har ein fólkafundur so verður hildin. Onkur fer ivaleyst at halda røðu, eins og sungið verður, væntar Dímunarbóndin. Og uttan iva fer eisini onkur at taka seg niðan á oynna, um veðrið er til tess.

Og júst veðrið er altavgerandi. Viðrar ikki, verður rímiligt heldur eingin túrur.

Um fuglin í oynni í ár, sigur Óla Jákup úr Dímun, at enn hevur ikki tað stóra verið at sæð.

Lundin er lagstur, og einki óvanligt er í, at ikki er so nógv at síggja til hann hesa tíðina. Men hann metir ikki, at tað er tað sama í ár, sum var hesa tíðina í fjør kortini.

Lomvigin er á leið tann sami, sum undanfarin ár, sigur hann. Hann dugir hvørki at síggja øking ella minking. Og ritan er farin at reiðrast.

So alt gongur sína vanligu gongd, sum árstíðin nú er til, sigur Óla Jákup úr Dímun, bóndi í Stóru Dímun.

## Nýtt hotell í Reykjavík

**Hotel Atlantis í Reykjavík liggur stutt frá Laugardali. Hotellið hevur 18 kømur, umframt at níggju íbúðir eisini hoyra til**

Tann 1. juni læt Hotel Atlantis upp á Grensasvegi 14 í Reykjavík. Hotellið liggur eitt sindur uttan fyri sjálvan miðbýin, stutt frá Laugardali, har góðir møguleikar eru til eitt nú at svimja, eins og djóragarður er í sama øki.

Til hotellið hoyra 9 íbúðir, sum liggja ymsastaðni í býnum, eins og 18 kømur eru á sjálvum hotellinum. Ætlanir eru longu nú um at byggja út, soleiðis at kapasiteturin verður øktur við umleið 50%, verður sagt í tíðindaskrivi frá hotellinum.

Gestunum á hotellinum stendur í boði at leiga sær bil, sum er bílaigari enn onnur billeiga í Reykjavík, verður sagt. Og møguleikarnir fyri útferðum eru góðir á Suðurnesjum og í økinum rundan um Reykjavík yvirhøvur.

Tað er hálvur føroyingur, mamman er ættað úr Vági, sum eigur hotellið, verður sagt í tíðindaskrivi frá nýggja Hotel Atlantis í Reykjavík.

**ej**

## Skúlatýrisval á Strondum

**Fyrsta skúlastýrið við Stranda Skúla, sum skipað er eftir nýggju lógini, varð valt mánadagin**

SKÚLASTÝRISVAL

Til skúlaráðsvalið við Stranda Skúla høvdu 174 fólk valrætt, og 107 vóru á vali. Hesi skuldu velja trý foreldraumboð í skúlaráðið.

Sum foreldraumboð til Stranda skúla vórðu vald: Súni Kristiansen, Skáli, Carolina Johansen, Strendur og Kathrina G. Joensen, Strendur.

Nýggja lógin sigur, at í størru skúlunum skulu trý foreldraumboð, eitt starvsfólkaumboð og tvey kommunal umboð veljast.

Stranda Skúli hevur valt Súsonnu Nilssen sum starvsfólkaumboð, og Sjóvar Kommuna hevur valt Artur Johansen og Eivind Jacobsen at umboða kommununa.

Nývalda skúlastýrið tekur við tann 1. august 2001.

**ej**



# Skúlastýrið sum bindiliður

**Skúlastýrisvalið er farið afturum bak, og stýrini eru nú mannaði. Teirra fremsta uppgáva verður at virka sum ein bindiliður millum skúlan og heimið, heldur nývaldur limur**

SKÚLASTÝRI
*Stefan í Skorin*

Sambært nýggju fólkaskúlalógini skal hvør skúli hava eitt skúlastýri, mannað við foreldrum at næmingum. Valið var 28. mai, og nú er greitt, hvør skal manna stýrini.

– Tað er av stórum týdningi, at samstarvið millum heimið og skúlan er gott. Eisini skulu foreldur kenna, at tey kunnu venda sær til skúlan, um tey hava okkurt uppskot um, hvussu viðurskifti av ymiskum slag kunnu betrast, sigur Høgni Mohr, ið varð valdur í skúlastýrið í Tórshavnar Kommunuskúla við 19 atkvøðum.

Hann leggur afturat, tað er av alstórum týdningi, at leiðslan á skúlanum eisini tekur tað í álvara, sum foreldrini hava uppá hjarta.

Høgni Mohr sigur, at skúlastýrið skal vera við til at økja um áhugan hjá foreldrunum fyri skúlanum. Eisini leggur hann dent á, at børnini skulu hava áhuga í hvørjum øðrum, fyri at alt skal ganga lættari.

– Tað er ómetaliga týdningarmikið, at foreldrini hava áhuga í skúlanum og eru meira við í virkseminum kring skúlan hjá barninum.

### Karmarnir skulu betrast

Høgni hevur eitt ítøkiligt hjartamál, tá talan er um skúlan hjá hansara børnum. Tað er at betra um karmarnar.

– Mítt hjartamál er at betra munandi um teir fysisku karmarnar á skúlanum. Ætlanir hava leingi verið um at umbyggja og gera broytingar, men tað verður útsett nakrar ferðir. Á tí økinum fara vit at streingja á, sigur Høgni.

Í sama viðfangi leggur hann afturat, at hann enn ikki veit, hvussu hetta stýrið fer at virka, tá arbeiðið byrjar av álvara. Hann metir tað vera ógvuliga týdningarmikið, at stýrið finnur sína røttu legu í virkseminum kring skúlan, tí tað eru nógvir partar, ið skulu samansjóðast.

– Eg vóni, at stýrið kann vera við til at betra um sambandið millum skúlan og heimið.

Stýrið skal sostatt vera ein liður millum skúlan og heimið, sum bindir saman



*Skúlastýrini eru vald, og fremsta uppgávan hjá teimum verður at virka sum bindiliður millum skúlan og heimið Savnsmynd*

Høgni Mohr sigur, at hann fekk áheitan frá grannunum um at stilla upp, tí nógv børn í skúlaaldri eru í grannalagnum. Hann játtaði og varð valdur í stýrið, har hann nú skal sita komandi trý árini.

– Hetta er ein álvarsom uppgáva, sum eg gleði meg at fara undir, sigur Høgni Mohr.

Hann heldur tað samstundis vera løgið, at 320 fólk meldaðu seg sum veljarar, men bara 162 greiddu atkvøðu.

## Fólkaskúlaráðið farið til verka

**Fyri stuttum setti Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður við undirvísingarmálum, eitt fólkaskúlaráð, sum skal geva honum ráð í øllum málum um fólkaskúlan**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Fólkaskúlaráðið er valt í mars mánaði í 2001 í eitt trý ára skeið og hevur sjey limir. Manningin í ráðnum er Sámal í Skorini, formaður, Jógvan Krosslá, Jákup av Skarði, Elsa Birgitta Pálsdóttir Petersen, Jóhanna Maria Johannesen, Kristianna á Lofti og Hanus Joensen.

Landsstýrismaðurin hevur gjørt greitt, at hann ikki fer at leggja ráðnum lag og avgera, hvat tað skal leggja dent á í sínum arbeiði. Fólkaskúlaráðið verður av landsstýrismanninum spurt um ymisk viðurskifti, sum tað síðani skal lýsa gjølla.

Uppgávan hjá ráðnum skal vera at meta um gongdina í fólkaskúlanum og menningarmøguleikar og við støði í hesum at ráðgeva landsstýrismanninum. Eisini skal tað ummæla tey mál, ið landsstýrismaðurin leggur fyri ráðið.

Harumframt kann ráðið av egnum fyritakssemi viðgera og ummæla øll mál, sum hava týdning fyri fólkaskúlan. Eisini kann tað mæla landsstýrismanninum til at seta í verk ymsar menningar- og granskingarverkætlanir.

Nýggja fólkaskúlaráðið er farið til verka og hevur havt sínar fyrstu fundir.



*Nýggja fólkaskúlaráðið, sum skal ráðgeva landsstýrismanninum um fólkaskúlan. Her avmyndað frammanfyri undirvísingar- og mentamálastýrinum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

